# Toppdystur á Sevmýri

**Í botninum hevur LÍF møguleika at sleppa undan hóttanini um beinleiðis niðurflyting**

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Rættuliga avgerandi toppuppgerð verður seinnapartin í dag á Sevmýri. Oddaliðið ÍF skal vitja TB, sum síðani summarsteðgin hevur sett seg alt tyngri á næstfremsta plássið og harvið møguleikan um endaspæl fyri at røkka í 1. deild. Um TB skal hugsa um at taka ÍF aftur og harvið at flyta beinleiðis upp, so skulu tvøråmenn vinna trý stig í dag. Um ÍF vinnur á Tvøroyri í dag, so skal vilja heilt illa til, um teir ikki skulu vinna deildina. Í sætta umfarinum vann ÍF á heimavølli 4–2 ímóti TB.

AB, sum er á bronsuplássinum, skal í dag spæla ímóti grannunum í B36, sum síðani summarsteðgin hava vunnið hvørja ferð. Dysturin teirra millum i Gundadali endaði 1–1. Sumba, sum er á fjórða plássi, fær vitjan av B71, sum framvegis er í vanda fyri at flyta niður. Dysturin teirra millum á Sandi endaði 1–1. KÍ og VB, sum liggja undir liðini á hvørjum øðrum mitt á talvuni, skulu spæla í Klaksvík. Á Vágseiði vann VB 5–1.

LÍF, sum er næstaftast, fær vitjan av B68, sum er nógv aftast. Um B68 skal gera sær vónir um at halda fram í deildini,so skulu teir fáa stig og helst vinna í dag. Á Svangaskarði vann LÍF 2–0.

# AB tapti dystin

**Kappingarnevndin hjá FSF hevur gjørt av, at AB verður dømt at tapa dystin, sum teir annars vunnu 2-0 á Sumba**

KÆRA
*Jákup Mørk*

Mikið rok tók seg upp, eftir at AB tann 30. august hevði vunnið 2-0 á Sumba í aðru deild. Fyri sumbingar var hetta ein stórur smeitur í royndunum at vinna sær uppflyting, men tað var nú ikki hetta, sum rokið stóðst av.

Sumbingar vildu nevnliga vera við, at annar av málskjúttunum hjá AB í dystinum, Tom Iburg, ikki hevði loyvi at spæla. Hann hevði ananrs fingið leikloyvi frá FSF stutt undan dystinum, men sumbingar mettu, at hetta varð givið undir skeivum fortreytum.

## Villleiðandi upplýsingar

Orsøkin til, at FSF av fyrstan tíð hevði útskrivað leikloyvið, var, at AB vísti til grein 14 í kappingarreglunum, har tað verður staðfest, at um leikari flytir av landinum, so var ikki talan um at skifta felag. Hetta viðvirkaði til, at FSF góðtók at víkja frá regluni, sum sigur, at leikari ikki kann skifta felag eftir 10. aug.

AB grundaði hetta á, at leikarin hevði verið búsitandi í Danmark, og tað var hetta, sum sumbingar ikki vildu góðtaka. Leikarin hevði nevnliga ongan tíð flutt bústað úr Føroyum.

At málið síðani hevur fingið drúgva viðgerð hjá FSF komst av, at ivi var um, hvussu kæran skuldi viðgerast. Leikloyvið varð alt fyri eitt tikið aftur, men spurningurin var, hvat skuldi henda við dystinum. Sambært kappingarreglunum kann eitt felag nevnliga rokna leikaran sum lógligan, hava teir móttikið leikloyvið frá FSF, og tað hevði AB jú.

Upprunaliga skuldi viðgerðin av málinum fara fram, tá kappingarnevndin hevði fund á Skotlandsferðini herfyri, men tá Christian Andreasen, sum umframt nevndarsessin er løgfrøðingur, ikki fekk verið við á ferðini, varð avrátt at bíða við endaligu viðgerðini.

Ístaðin var hendan so á Svangaskarði mikukvøldið, og her varð avgerð tikin um, at AB skuldi dømast at tapa dystin. Okkum eydnaðist ikki at fáa viðmerkingar frá kappingarnevndini, men tað er einki at ivast í, at hendan støðan er tikin, tí leikloyvið upprunaliga varð grundað á villeiðandi upplýsingar, og at nevndin tí hevur vikið frá reglunum um, at felagið ikki kann lastast, hava teir fingið leikloyvið.

Sostatt skiftu trý stig hendur mikuvkøldið, og fyri sumbingar merkir hetta í øllum førum, at teir nú aftur eru við í stríðnum um uppflyting. Bert eitt stig aftanfyri TB. Hjá AB er støðan nú hinvegin tann, at liðið misti eitt stórt fet í uppflytingarstríðnum.

## Hvat við leikaranum

Spurningurin er so, hvat hendir við leikaranum sjálvum. Áðrenn ætlaða skiftið til AB var hann skrásettur hjá B36, og tað er hann sum so framvegis.

B36 hevur eisini sagt, at teir fegnir vilja nýta leikaran, men spurningurin er nú bert, hvørt hann hevur loyvi til hetta. At leikloyvi er í lagi, er einki at ivast í, men reglurnar siga eisini, at tað skala ganga ein mánaður ímillum dystir, tá áhugaleikari skiftur felag. Spurningurin er tí í løtuni, hvørt Tom Iburg var á AB-lið-num, tá dysturin móti Sumba varð leiktur ella ikki.

# Gráir týdningar í Meiarínum



*Oddfríður Marni Rasmussen fer at lesa upp yrkingar við tónleiki sum mótspæli og viðspæli*



*Tónleikararnir Andras Olsen (á myndini), Kristian Blak og Rógvi á Rógvi fara at standa fyri tónlistarligu myndunum*

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 13. sept. klokkan 19:30 og sunnudagin 14. sept. klokkan 16:00, verur upplestur í Meiarínum. Oddfríður Marni Rasmussen fer at lesa upp egnar yrkingar og tekstir, ið nevnast "Gráir týdningar". Saman við honum spæla tónleikararnir Kristian Blak á pumpuorgul, Andras Olsen á trombon og Rógvi á Rógvu trummur og slagverk.

Tekstirnir eru skrivaðir innan tey seinastu tvey árini. Meginparturin er skrivaður um eina ferð í USA. Gjøgnumgangandi er hetta fyribrigdi - ikki at minnast - ikki gloymskan sum so, heldur eitt slag av minnisloysi.

Upplesturin er í trimum pørtum, sum verða lisnir samanhangandi. Fyrsti partur er skrivaður sum stuttfilmar. Annar partur sum ein long yrking og triðji partur er skrivaður sum málningar. Leikluturin hjá tónleikarunum, er at virka sum mótspæl og viðspæl til tekstirnar, ið verða lisnir.

Upplesturin "Gráir týdningar" kostar 100 kr. við MVG.

# Óli Poulsen við nýggjari gamlari fløgu




ENDURÚTGÁVA
*Rúnar Reistrup*

Í 1983 kom kasettubandið "Vónir" út í føroysku handlarnar. Aftanfyri tónleikin á bandinum stóð tann tá 19 ára gamli Óli Poulsen. Upptøkurnar gjørdi hann við einum 8 spors bandupptakara undir takloftinum á Ebenezer.

Óli Poulsen hevur síðan skift takloftið á Ebenezer og 8 sporaða bandupptakaran út við heldur meira framkomnari studio og upptøkuútgerð, og vit onnur hava pakkað okkara kasettubandspælara niður.

Tí hevur Óli Poulsen, ið hevur havt sína yrkisleið sum tónleikaprodusari í Danmark, valt at bøta eitt sindur um ljóðgóskuna á upprunabandinum og geva "Vónir" út aftur sum fløgu.

Tað er Judy Andersen, systur Óla, ið syngur allar uttan ein sang á bandinum, sum nú liggur í handlunum sum fløga.

SUZUKI LIANA 1,6
169.500,-
Ein rúmligur familjubilur við nógvari útgerð, so sum:
*Aircondition*
*Alufelgur*
*Hiti í setrunum framman...*




Spf. Eyðbjørn Hansen
FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375

Konfirmatións-
klæðir til
hansara
fáast í



Kallkyn
Vágsbotnur
Tel. 31 62 06

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2945, P/F Kaldbaks Seafood, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Rói Egholm, Hagagøta 6, 160 Argir.
**Innkomin í nevndina:** Kaj Leo Johannesen, á Teigi 6, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Bjarki Ernst Mohr, Landavegur 72, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum stjóri:** Rói Egholm, Hagagøta 6, 160 Argir.

*Skráseting Føroya tann 11. September 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3074, Sp/f ORCA, 160 Argir

**Viðtøkur broyttar:**
13.08.2003.
**Kapitalur:**
Lækking við kr. 151.000,00 til kr. 99.000,00 til rindan av halli.
Hækking við kr. 1.000,00 til kr. 1.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 1.000,00 til kurs 5.000.

*Skráseting Føroya tann 11. september 2003*
*Kristin Balle*

Datasamskiftistøkningur



el & tele

Vegna vaksandi virksemi innan datasamskifti, søkir el & tele eftir einum dugnaligum og sjálvstøðugum datasamskiftistøkningi.

**Arbeiðið fevnir um**
Design, konfiguratión, uppsetan og support av datasamskiftisloysnum bæði av LAN, WAN, WWAN; WLAN og internet samskiftisloysnum.

Tú skal arbeiða í einum tvørfakligum toymi við 8 starvsfólkum, sum arbeiða við data- og telesamskifti. Tín høvuðsuppgáva verður ráðgeving, design og konfiguratión av LAN, WAN, troygdarloysnum og Wireless. Vit nýta veitarar sum Cisco System, Linksys, Nortel Network v.m.

**Krøv til umsøkjaran**
Tú skal hava eina viðkomandi útbúgving so sum datalog, dataverkfrøðingur, DØK, datamatikari, ella líknandi. Hevur tú eina Cisco certificering er hetta ein fyrimunur.

Royndir innan datasamskifti og hollan kunnleika í design, konfiguratión og support av LAN, WAN, trygdarloysnum og Wireless er ein fyrimunur. Tann, ið settur verður skal dáma at fáa nýggjar avbjóðingar, verða nærløgd/ur og strukturerað/ur. Felksibilitetur, intiativ, samarbeiði og sjálvstøða er týdningarmikið, tá ið ein skal arbeiða í einum tvørfakligum toymi. Eisini er samskifti við kundan og starvsfelagar av størsta týdningi.

**Vit bjóða**
- Eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum uppgávum
- Eitt áhugavert arbeiðspláss har vit leggja áherðslu á, at halda okkum dagførd við nýggju tøknina.
- Løn eftir avtalu
- Skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Til tíðir er nógv at gera, og tí kann yvirarbeiði væntast.

Um tú hevur spurningar kanst tú venda sær til Sóleyð Hofgaard, rakstrarleiðara.

Umsókn við CV, prógvum og evt. viðmælum, skal vera el & tele í hendi innan 22. september 2003.

el & tele
att: Sóleyð Hofgaard
Argjaboðagøta 7 · Postboks 2060
FO-160 Argir · smh@eltele.fo

**el & tele** veitir ráðgeving, design, sølu og tænastur av heildarloysnum innan datasamskifti, tele og el. **Missiónin** hjá el & tele er at menna og víðaribera nýggjastu og fremstu tøknina til kundar okkara. Starvsfólkið hjá el & tele tryggjar hetta, við støðugari útbúgving. Tað eru 16 fólk í starvið hjá el & tele í løtuni.

Rør & Blikk
RØR- & BLIKKSMIÐIR
Søkt verður eftir tveimum rørsmiðum ella fólki við royndum innan HVS arbeiði, at byrja beinanvegin á byggiplássi í Havn.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

*Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar.*

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn,
tlf: 322 999 far 225 345
www.rorblikk.fo

Grillbar til sølu

Um hóskandi boð fæst er grillbarr til sølu.

Gólvvíddin 147 kvm. Sera vælegnað til ymiskt handilsvirksemi.

**Tlf. 373193 ella 373990**

FRANK HERLUFSEN
MÚRARAVIRKIÐ
522 347
322 347

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo